Heystsetan 2022

frá 28. september til 11. oktober

Síða 2

VÍSMENNINIR Á VAGLINUM

Teir tríggir professararnir trína aftur á pallin í heyst fyri at oysa úr sínum vísdóms-keldum. Tað verður ikki keðiligt. Hóast fakmenn, eru teir allir tríggir humoristar.

Síða 2

FYRSTAFLOKS UNDIRHALD

Í heystsetuni fara vit eisini at njóta tveir av okkara allarfremstu undirhaldarum, Robert og Hilmar Jan. Og man Jákup Pauli ikki eisini ætla sær at leggja leiðina framvið?

Síða 3

SÓLORK'ESTRIÐ

Reint krem-de-la-krem: Signar í Homrum, Kim Hansen, John Johansen og Jens Marni Hansen. Eisini spæla Azucéna & Dari, Duo Intermezzo, Alberto, Black Glitter o.o.

Síða 4

ÚTFERÐIR OG TILTØK

Vit vitja nógv vøkur og spennandi stað, frá víngarðinum og fiskamarknaðinum til Skøltanna Helli, Guadalest, Altea, golfbreytina og Benidorm Palace

Síða 5

GISTING OG PRÍSIR

Mitt í lítla hugnaliga býnum Albir hava vit 40.000 fermetrar av føroyskum grannalagi. Her kanst tú gista í nýumvældum kømrum ella góðum íbúðum.

Vísmenninir á Vaglinum

Í heyst trína teir aftur á pallin á Vaglinum – teir tríggir klóku sólorku-professararnir: Pál Weihe, Eyðun Andreassen og Jóan Pauli Joensen. Tilsamans vita teir alt, sum er vert at vita, og nakað væl afturat, og tí ætla vit okkum at gera okkum dælt av.

Professorala triumvirat okkara fer at orna framløgurnar á Vaglinum. Ætlanin er at fortelja og kjakast um alt millum himmal og jørð – frá ramum gandi og gomlum føroyskum heimaráðum til boppudólgar og skrindusúpan. (Á myndini hava teir longu sett skjøtil á).

Nú eru teir fakmenn, so skil verður í galskapinum, men hóast tungu tingarligu heitini eru teir allir kendir sum humoristar.

Fyrstafloks undirhald



Tilsamans hava teir væl yvir hundrað ára royndir á palli, og nú fáa vit aftur eitt forkunnugt høvi til at uppliva teir.

Robert McBirnie og Hilmar Jan Hansen kunnu fylla pallin saman og hvør sær, og undirhald teirra fevnir um alt frá skemtisøgum, tættum og herming til syrpur og annan sang.

Tveir av fólkakærastu undirhaldarum okkara, ið duga eitt sindur av hvørjum, fara at lívga um okkum í heystsetuni, har teir í fleiri umførum fara at leita fram nýtt og gott gamalt.

Leysasøgur siga, at hesin til vinstru fer eisini at leggja leiðina framvið.

solorka

Sólork’estrið

og hópurin av øðrum góðum tónleiki!

Aftur í heyst verður sólorkusetan á tremur við fyrstafloks tónleiki. Tónleikarar okkara koma úr ymsum heraðshornum – Føroyum, Spania, Kili, Venezuela, Ungarn og Onglandi.

Húsorkestur okkara, sum sjálvandi eitur Sólork’estrið, er mannað við reinum krem-de-la-kremi, nevniliga Kim Hansen, Jens Marna Hansen, Signari í Homrum og John Johansen. Teir fara at spæla saman eins væl og í smærri samansetingum bæði á Vaglinum og í Klubbanum.

Góðu vinir okkara, kilensku hjúnini Paola og Hector (Duo Intermezzo), koma at syngja fyri okkum. Bæði eru tey útbúgvin á konservatoriinum í Santiago de Chile.

Eisini tveir aðrir vinir, venezuelanska Azucéna og ungarski Dari, fara at spæla – hon á hørpu og hann á gittara. Tey eru tveir spennandi tónleikarar, sum spæla alt frá stillum vísum til harðan rock. Tit kunnu bara velja, hvat tit vilja hava.

Gittarsnillingurin Alberto, sum allir sólorkugestir kenna, hevur játtað at leggja leiðina framvið aftur.

Somuleiðis sponsku-ensku Black Glitter, sum eisini áður hava ríkað okkum løturnar við tónleikasløgum líka frá 1950-unum fram til í dag.

Sólork’estrið: Signar í Homrum, Kim Hansen, John Johansen og Jens Marni Hansen

Duo Intermezzo – Paola & Hector (Chile)

Azucéna (Venezuela) & Dari (Ungarn)

Gittarsnillingur okkara Alberto Fuggini

Spanski-enski bólkurin Black Glitter

Túrar og tiltøk fyri lagaligar prísir

solorka

Ein seinnapartur á bryggjuni

Vit uppliva ein lívligan seinnapart á bryggjuni í grannabýnum Calpe. Vit taka móti bátunum, tá teir koma inn at landa og fylgja uppboðssøluni av veiðuni. Vit fara eisini til borðs á fiskamatstovuni.

Bergtakandi Altea

Vit endurnýggja nú innihaldið í vitjan okkara í vakra, vælhildna og vælumtókta gamla grannabýnum við teimum stórbæru kirkjunum, teirri katólsku og teirri russisku-ortodoksu.



Golf-hugni

Ein stuttligur seinna-partur við sjarmerandi læraranum Miguel, sum lærir okkum sløgini

Skøltanna Helli og El Cid

Vit vitja 150 milliónir ára gomlu Cuevas de las Calaveras, har tey hava funnið elligomul mannabein. Vit njóta okkurt lætt á matstovuni El Cid, frætta um krígsharran við sama navni og læra klassiska bowling.

Víngarðurin

Vit henta drúvurnar, smakka á vínið og eta og hugna okkum við bóndans borð.

Benidorm Palace

Vit njóta eitt festligt kvøld við góðum mati, frálíkum framførslum og flottum búnum

Guadalest

Vit vitja vakra Guadalest við tí frálíka útsýninum – helst mest vitjaðu bygdina í Spania

Albir Garden Resort

Mitt í lítla hugnaliga býnum Albir hava vit 40.000 fermetrar av føroyskum grannalagi. Her kanst tú gista í nýumvældum kømrum ella góðum íbúðum. Vit hava okkara egna vatnland, og her eru eisini svimjihyljar bæði úti og inni. Tú kanst brúka venjingarrúmið og hitarúmið, og fyri lagaligt gjald kanst tú fáa massasju.
Tað er eisini her í tí stóra urtagarðinum, at tú kanst njóta allar løturnar á Vaglinum og í Klubbanum.
Hiðani tekur tað bert einar 15 minuttir at spáka oman á strondina gjøgnum miðbýin fram við nógvum matstovum, kaféum og krambúðum.



www.albirgardenresort.com

Kr. 13.690,-
fyri hvønn, um tvey gista saman

PRÍSURIN FEVNIR UM

- **Beinleiðis flúgving / busskoyring**
- **Gisting í íbúð ella superiorkamari, um tvey gista saman. (Eykagjald fyri einakamar: kr. 1.950,-)**
- **Fulla pensjón v/drykkjuvørum**
- **Føroyskar vertir, hjálparfólk og lækna**
- **Reseptión á Vaglinum við ókeypis kafé og spennandi skrá hvønn dag klokkan 18**
- **Kvøldarhugna og dans við livandi tónleiki**
- **Høvi at tekna teg til nógvar áhugaverdar útferðir fyri lagalig eykagjøld.**

solorka@solorka.com • tlf. 221090